# Klaksvíkar Móðir Theresa er farin

Besti vinur mín seinastu 22 árini er farin.

Beint áðrenn midnátt 07. oktober fingu kona mín, Lovisa og eg boðini um, at besta vinkona Lovisu og besti vinur mín, Martha Johansen var farin, bert 42 ára gomul.

Tá helt jørð, sól, máni og stjørnur uppat at mala og lívið sjálvt misti alla megi.

Vit vistu væl, at tíðin var stutt – alt ov stutt, men hóast tað, so vónaðu vit øll – ella vildu vóna, at hon hóraði undan. Ikki so nógv fyri okkara skuld, men tí vit vistu at heima í Klaksvík sótu Egil, Jákup Eli, Ingrid, Gerd, Marner og megnarstuðul Marthu, Gertrud í einum óskiljandi einsemi, lamsligin av sorg.

Martha var ikki hvør sum helst, og tað sást best á tí mikla skaranum, sum fylgdu Marthu – 1500 fólk. Men ikki minni sást tað tá allir útróðrarbátarnir í Klaksvík vundu flaggið á hálva stong. Henda samkenslusýning var so óvantað, at Jákup Eli, pápu Marthu hugsaði við sær sjálvum: »So, nú er onkur av okkara útróðramonnum farin!« Ikki visti hann tá, at hetta var tí allur býurin syrgdi hansara egnu dóttir.

Aldri fyrr havi eg hoyrt so nógvan grát av so mongum sum tann dagin Martha varð jarðað, og at missa er ikki ókent hjá mær. Sjálvur havi eg mist alt hús mítt og longu sum 26 ára gamal hevði eg mist ikki færri enn 19 vinfólk. Men eingin teirra varð syrgdur so nógv sum Martha henda dagin í Klaksvík.

Men Klaksvíkin hevði eisini mist ein stóran vin.

Kvinnan sum var góð við øll, kvinnan sum í egna handli sínum, Sjóbúðini, rak Føroya størsta sosiala virksemi og har lívgaði øllum teimum, sum annars onga lívd funnu. Hon gjørdi ikki mun á lágum og høgum.

Klaksvíkar Móðir Theresa var farin.

Martha var sjúk í 2 ár, men tá fólk full av iva og sorg komu at vitja hana og Egil, antin heima í Klaksvík, á Ríkissjúkrahúsinum, á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, Hotel Tórshavn ella á Humlegården í Humlebæk, so var tað mestsum altíð Martha sjálv sum uggaði hini og sendi tey avstað aftur við einum løttum sinni.

Vit høvdu mangar løtur saman á Hotel Tórshavn saman við Marthu og Egil, onkra her úti í Klampenborg ella í Humlebæk, men aðru hvørja løtu rungaði láturin har Martha sum oftast førdi ann. Ja, heilt til tað síðsta livdi hon sum tann altíð fríða og lívsskapandi kvinnan hon var.

Tær álvarssomu løturnar upplivdi eg mestsum allar tá Martha og eg tosaði í telefonini í óteljandi tímar. Men hvussu svartar løturnar vóru, so endaðu tær altíð, eins og tær byrjaðu, við skemti og látri. Tá kallaði hon seg aldri annað enn »Trøllið undir Fjallinum«. Men soleiðis var Martha, besti vinur mín nakrantíð.

Men eisini kona mín, Lovisa, hevur mist bestu vinkonu sína, barnavinkonuna og lívsvinkonuna Marthu. Og sum Lovisa sigur, so eru vit ikki tey einastu sum hava havt hana sum bestu vinkonu. Martha hevði ein ómetaligan vinarskara, og á ein ella annan hátt, so megnaði hon at lata øll kenna seg sum vóru tað júst tey, sum vóru nakað serstakt. Soleiðis var Martha bara.

Lætta lyndið hevur Martha tó ikki frá fremmandum. Pápin, Jákup Eli er sera skemtingarsamur og hittinorðaður og mamman, Ingrid, hevur altíð hav stutt til láturs. Martha minnir meg í so máta nógv um abbasystrina, Lenu Lydersen norðuri á Bakkanum, sum doyði 1995, 95 ára gomul. Altíð í góðum lag, altíð lúrin og stuttlig at vera saman við. Men Egil er so sanniliga eisini skemtingarsamur og stuttligur at vera saman við. Og vón mín er at júst hesin eginleiki verður við til at stytta og lætta um sorgina og saknin, at tað, saman við trúnni á Jesus og styrkina í sanginum og tónleikinum fer at bera tey ígjøgnum.

Og júst hetta við sanginum og tónleikinum er nakað serligt í Klaksvík, og var nakað serligt hjá Marthu. Tað ber ikki til at skilja fólkið har norðuri frá sangi og tónleiki – tey eru eitt, eins og Martha og sangurin vóru eitt. Og tað var mangan Martha fyri mær og Lovisu sang eina reglu úr einum av mínum egnu sangum: »Tí eg veit at handan skýggjið, er luftin altíð blá!« Og soleiðis var Martha eisini! Hon trúði hesum so nógv, at øll tey 1500 sum fylgdu Marthu til gravar vórðu merkt fyri lívið av hennara trúgv. Ja, okkara trúgv, og okkara hugsan um hvørji eru hetjurnar her á jørðini varð broytt fyri lívið. Hetjurnar vóru har: Presturin Meinhard Bjartalíð; vinkonan Gertrud og maður hennara Kalli, og børn teirra; pápin Jákup Eli; maður hennara Egil; mamman Ingrid; systurin Gerd og mong, mong onnur. Og høvuðspersónurin, Martha var tann sum eggjaði øllum at halda fastari um trúnna, hóst tað var hon, Martha, sum var tann nívda. Men soleiðis var hon bara, Martha.

Og júst tí, eru øll orð søgd. Martha hevur longu sagt tey. Hennara álit á Harran vaks dag um dag, tíma um tíma og hon lærdi okkum loyndarmálið um trúgv og álit. Og tí er bert eftir at siga, sum Tom Sonntag syngur í sanginum, hann skrivaði Marthu:

– Martha, vi ses igjen på andra sidan havet!

**Vinfólk tíni**
**Jón og Lovisa Ellendersen**

# Sandbátur rendi á glastrevjabát



*Sandbáturin Burgundia rendi á glastrevjabátin Nancy úr Klaksvík týsmorgunin um sekstíðina*

**Týsmorgunin klokkan eitt korter til sjey bleiv ein glastrevjabátur niðursigldur av sandbátinum Burgundia í Klaksvík. Glastrevjabáturin sakk. Tað kundi verið álvarsamt, men dugnaskapur og hepni gjørdu sítt til, at ongin fólkaskaði hendi**

ÓHAPP
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:**
Glastrevjabáturin Nancy úr Klaksvík sakk týsmorgunin eftir at sandbáturin Burgundia rendi á hann. Ein maður var umborð á Nancy, og hann bleiv bjargaður í øllum góðum umborð á sandbátin.

Tað kundi verið sera álvarsligt, tí tað gekk bert ein lítil løta frá tí óhappið hendi, til báturin sakk.

Sosialurin frættir frá løgregluni í Klaksvík, at tað óivað var ein blandingur av hepni og dugnaskapi frá øllum pørtum, at tað ikki bleiv álvarsligari enn tað sama. Tí tað varð borið skjótt at. Menninir royndu at bjarga Nancy, men tað var vónleyst.

Løgreglan í Klaksvík greiðir frá, at Burgundia hevði ligið við oljukeiina í Ánunum og var á veg inn til Klaksvíkar, tá hann rendi á glastrevjabátin.

– Eftir øllum at døma hevur skiparin á Burgundiu ikki sæð glastrevjabátin, sigur vakthavandi á løgreglustøðini og leggur aftur at, at tað verður sagt, at glastrevjabáturin varð árendur, tí hann lá stillur, meðan sandbáturin sigldi.

Annars vil løgreglan ikki koma við nakrari niðurstøðu sum er, tí málið verður kannað nú. Og hon skal tosa við báðar partarnar, og so verður sjóforhoyr. Enn er tó ikki greitt, nær tað verður.

Finnur Johannesen átti glastrevjabátin, sum var 30 føtur. Hann var í ferð við at draga gággurúsur, tá óhappið hendi. Hann vil ikki siga nakað um óhappið, áðrenn sjóforhoyr hevur verið.

– Tað einasta eg vil siga beint nú er, at eg eri á lívi, og tað er tað týdningarmiklasta. Eg vil ikki risikera, at eg sigi nakað nú við fjølmiðlarnar, sum seinni kann verða nýtt í móti mær, sigur ein týðuliga skelkaður Finnur Johannesen.





# Kringvarpsskattur

**Annlis Bjarkhamar, landsstýrismaður í mentamálum, ætlar at avtaka útvarps- og sjónvarpsgjaldið. Í staðin skal peningurin til stovnarnar krevjast inn umvegis skattin, sum eitt kringvarpsgjald.**

LOFTMIÐLAR
*Jón Brian Hvidtfeldt*



*Útvarp Føroya fær 16,7 milliónir krónur um árið í lurtaragjaldi. Henda inntøkukelda skal strikast, og í staðin skal Útvarpið fáa pengar umvegis eitt kringvarpsgjald, sum verður goldið um skattin*

Stendur tað til landsstýrismannin í mentamálum, Annlis Bjarkhamar, fara útvarps- og sjónvarpsgjøldini skjótt í søguna. Ætlanin er at strika hesa inntøkukeldu hjá almennu loftmiðlunum, sum í staðin skulu fáa pengar frá einum kringvarpsgjaldi.

Í dag skal hvørt húski í Føroyum gjalda eitt útvarpsgjald og eitt sjónvarpsgjald uppá 1500 krónur hvørt, íroknað MVG. Harumframt skulu børn yvir 18 ár, sum búgva heima, somuleiðis rinda útvarps- og sjónvarpsgjald, hava tey hesi tól. Men sambært uppskotinum, sum landsstýrismaðurin hevur lagt fyri Mentanarnevndina hjá Løgtinginum, umframt útvarps- og sjónvarpsstjóran, skulu pengarnir í framtíðini krevjast inn umvegis skattin. Afturat vanliga skattinum, barnsburðargjaldinum, ALS-gjaldinum osv. skal í framtíðini krevjast inn eitt kringvarpsgjaldið frá øllum skattgjaldarum.

Sambært uppskotinum verður talan um eitt ávíst prosentgjald av inntøkuni, sum verður trekt í kringvarpsgjaldi. Hetta gjald kann, sambært uppskotinum, í mesta lagi vera 1600 krónur um árið fyri hvønn skattgjaldara. Til dømis fer hetta at merkja, at eini hjún við hampuligari inntøku í framtíðini skulu gjalda tilsamans 3200 krónur í kringvarpsgjaldi um árið. Tey gjalda í dag tilsamans 3000 krónur í ávíkavist útvarps- og sjónvarpsgjaldi. Harafturímóti fara fólk við lítlari ella ongari inntøku at skulu gjalda minni til Útvarpið og Sjónvarpið enn higartil.

Sum Sosialurin skilir, vísir roknistykkið hjá Mentamálaráðnum, at kringvarpsskatturin samanlagt fer at geva nakrar milliónur afturat um árið at býta til Útvarpið og Sjónvarpið, sammett við inntøkurnar frá lurtara- og hyggjaragjaldinum. Bæði tí at eingin fer at kunna sleppa sær undan at rinda gjaldið, umframt at fólk, sum arbeiða og búgva í Føroyum í styttri tíðarskeið, eisini koma at rinda henda skattin til loftmiðlarnar. Í ár fáa almennu loftmiðlarnir 16,7 milliónir krónur hvør í inntøku frá lurtara- og hyggjaragjaldi, og báðir stovnar meta seg fáa á leið tað sama inn næsta ár. Hetta er á leið tveir triðingar av samlaðu inntøkuni hjá stovnunum.

Uppskotið hjá Mentamálaráðnum fevnir bara um lurtara- og hyggjaragjøldini, og loftmiðlarnir fara tískil framhaldandi at hava inntøkumøguleikar av lýsingum og spølum.

## Uppskotið út til flokkarnar

Ætlaninar um at áseta eitt kringvarpsgjald skulu nú út til flokkarnar til umrøðu. Landsstýrismaðurin í mentamálum hevur kunnað útvarps- og sjónvarpsstjóran um ætlaninar, og harumframt var Mentanevndin í Løgtinginum og Miðflokkurin, sum ikki hevur umboð í nevndini, boðið við til fundin í Mentamálaráðnum.

Sum Sosialurin skilir er skotbráið stutt, tí eftir ætlan skulu broytingarnar fremjast longu næsta ár, fæst politiskur meiriluti fyri tí.

## Fámæltir stjórar

Hóast uppskotið kann fáa stórar avleiðingar fyri almennu loftmiðlarnar og teirra virksemi, so hava hvørki stjórin í Sjónvarpi Føroya, Mikkjal Helmsdal, ella stjórin í Útvarpi Føroya, Jógvan Jespersen, stórvegis viðmerkingar til ætlaninar hjá landsstýrismanninum í mentamálum.

– Eg havi ongar viðmerkingar til uppskotið. Eg varð kunnaður um tað í gjár, og nú fer uppskotið út til eina politiska viðgerð, sum eg ikki haldi at eg skal leggja meg út í, sigur Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri.

Og at kalla sama svar hevur sjónvarpsstjórin.

– Eg havi ikki tað stóra at viðmerkja til málið. Tað er jú ein politisk proces, sum fer í gongd nú, sigur Mikkjal Helmsdal. Hann sigur tó, at ein fyrimunur við ætlanini kann vera, at Sjónvarpið sjálvt sleppur frá at krevja inn hyggjaragjald, meðan vansin kann vera, at Sjónvarpið kemur tættari at politiska myndugleikanum.

Tí má hugsast um tiltøk, sum kunnu tryggja sjálvstøðugu, óheftu støðuna hjá Sjónvarpi Føroya, sigur Mikkjal Helmsdal.

Í seinastuni hevur sjónvarpsstjórin fleiri ferðir ført fram, at sjónvarpið hevur tørv á fleiri pengum. Mikkjal Helmsdal hevur tó ikki fingið lyfti frá landsstýrismanninum um fleiri pengar til Sjónvarpið eftir fundin í Mentamálaráðnum.

– Eg havi ikki fingið nøkur lyfti um fleiri pengar. Tann einasti, sum nevndi tað á fundinum, var eg sjálvur, sigur Mikkal Helmsdal.

## Inntøkukeldur hjá ÚF og SvF

Inntøkur hjá Sjónvarpi Føroya (mió.)

| | 2002 | 2003 |
|---|---|---|
| Sjónvarpsgjald | 16,7 | 16,6 |
| Lýsingar | 3,7 | 4,0 |
| Spøl o.a. | 2,7 | 3,5 |
| Ymsar aðrar inntøkur | 0,6 | 0,6 |
| Tilsamans | 23,7 | 24,7 |

Inntøkur hjá Útvarpi Føroya (mió.)

| | 2002 | 2003 |
|---|---|---|
| Útvarpsgjald | 16,7 | 16,7 |
| Kunngerðir o.a. | 6,6 | 6,6 |
| V4-spæl | 3,2 | 3,2 |
| Tilsamans | 26,5 | 26,5 |

*Tølini fyri 2003 eru metingar hjá stovnunum sjálvum.*



*Kingvarpsgjaldið, sum allir skattgjaldarar skulu gjalda í framtíðini, skal býtast millum Útvarpið og Sjónvarp Føroya.*

## Rætting

Í samband við greinina í blaðnum í gjár um útbjóðingina av asfalteringini av Vágatunnlinum er okkurt komið skeivt fyri.

Tilboðini, sum nevnd vera í greinini, fevna bara um koyringina av asfaltinum frá verkinum í Hundsarabotni til Vágatunnilin.

Vit biðja Landsverkfrøðingin og lesararnar halda okkum til góða.

**jbh**